## Handilsvinnan trýr ikki upp á vend



Føroyska handilsvinnan og føroyska byggivinnan síggja framvegis sera døpur útlit fyri framman. Tað sæst í búskaparmetingini hjá Landsbanka Føroya, ið kom út herfyri. Meðan allar vinnur í Føroyum sóu døpur útlit fyri frammaní januar mánaði í ár, tykist vend verða komin í í juni mánaði, serliga hjá tilfeingisvinnuni, øðrum ídnaði og tænastuvinnuni, sum tykjast halda, at tað ringasta er av. Hinvegin sær byggivinnan lítið minni dapurt upp á framtíðina, enn hon gjørdi í januar, meðan handilsvinnan sær munandi verri útlit frammanfyri sær nú. Handilsvinnan metir framvegis í juni mánaði, at sølan fer at minka, og at arbeiðstørvurin verður minni, enn hann er í verandi løtu.

## Brúkaraprístalið rapað niður

Føroyska brúkaraprístalið, sum vísir árliga prísbroyting, er rapað niðureftir síðani 3. ársfjórðing í 2008 til 2. ársfjórðing í 2009. Tað gongur fram í nýggjastu búskaparmetingini frá Landsbanka Føroya. Frá 3. ársfjórðingi 2004 til 3. ársfjórðing 2007 hevði brúkaraprístalið ligið støðugt á millum 1 og 3 prosent, sum merkir at prísvøksturin hevur ligið í miðal millum 1 og 3 prosent. Frá 3. ársfjórðingi 2007 til 3. ársfjórðing 2008 vaks brúkaraprístalið frá 3 prosentum til 8 prosent prísvøkstri, tá fíggjarkreppan brast á. Síðan tá er brúkaraprístalið rapað niðureftir, og annan ársfjórðing 2009 var talan um eitt prísfall á 0,9 prosent.

# Føroyingar á altjóða leiðslumenningarskeiði á IMD í Sveis

**Í summar var ein bólkur av Føroyingum á einum altjóða leiðslumenningarskeiði á víðagitna skúlanum IMD í Lausanne í Sveis. StatoilHydro skipaði fyri og stuðlaði luttøkuni**

LEIÐSLUMENNING

*John Eikhólm*



*Føroysku luttakararnir á OWP skeiðnum á IMD, juni 2009*

Í juni mánað 2009 fóru 16 vinnulívsfólk úr Føroyum til Sveis at luttaka í einum altjóða leiðslumenningarskeiði á heimskenda business skúlanum IMD í Lausanne, sum liggur við Geneve sjógvin í vestara partinum av Sveis.

Tað var ikki av tilvild, at so nógvir føroyingar fóru á skeið samstundis á hesum víðagitna business skúlanum. StatoilHydro hevði nevniliga stuðlað og fyriskipað skeiðsluttøkuna hjá øllum 16 vinnulívsfólkunum.

Stuðulin var latin sum partur av treytunum knýttar at leitiloyvunum hjá StatoilHydro, um at stuðla førleikamenningini hjá føroyska vinnulívinum (sí boks um førleikamenning).

StatoilHydro ynskti í hesum sambandi at senda ein bólk av vinnulívsfólkum á eitt altjóða leiðslumenningarskeið á IMD, sum fyritøkan sjálv hevur brúkt við stórum hepni í samband við leiðslumenning innanhýsis í samtakinum.

### Stutt um IMD

IMD í Lausanne hevur í mong ár verið ein av fremstu business skúlunum í Evropa, og er í dag ein av heimsins fremstu business skúlum í tættari kapping við kendar business skúlar úr Evropa og USA. Hetta framgongur millum annað av, at IMD í 2008 var kosin sum heimsins besti útbúgvingarstovnur innan 'Executive Education' av Financial Times, og sum heimsins fremsti MBA skúli av The Economist.

At IMD veruliga er ein altjóða stovnur sæst eisini á støddini av teirra alumni netverki, sum telur meira enn 60.000 limir úr 140 londum. (Sí www.imd.ch fyri nærri kunning um IMD.)

Nógvar fyritøkur kring allan heimin brúka IMD til at førleikamenna síni starvsfólk, og mælt verður til at føroyska vinnulívið, umhugsar at gera meira brúka av hesum framúrskarandi útbúgvingarstovni.

Eitt av høvuðsmálunum hjá IMD er, at fáa eina jaliga ávirkan á dagliga arbeiðið hjá luttakarunum aftaná skeiðsluttøku. Teirra slogan vísir eisini á týdningin av hesum: "IMD – Real world, Real learning".

### OWP skeiðið

'Executive Education' skeiðið sum tey 16 vinnulívsfólkini luttóku á, eitur 'Orchestrating Winning Performance' (kallað 'OWP'). OWP er eitt seks daga langt 'global business program', sum IMD hevur skipað fyri í 15 ár á rað, og er hetta einasta av sínum slag í heiminum.

Høvuðsendamálið við OWP í 2009, var at styrkja um førleikarnar hjá vinnulívsfólkum at skilja og duga at handfara stóru avbjóðingarnar vinnulívið møtir í niðurgongstíðum, umframt at læra fólk at síggja møguleikarnar hóast døpur útlit eru. Tí í niðurgangstíðum eru tað ofta góðir møguleikar at styrkja sína marknaðarstøðu til ein lagaligari kostnað, sum ein av professarunum á IMD tók til í einum fyrilestri.

Sjálvt skeiðið var sera intensivt, og skipað soleiðis, at hvør einstakur tók lut í fýra ymiskum breytum og arbeiðsstreymum hvønn dag millum kl 08:30-19:15 (sí boks um breytir og arbeiðsstreymar á OWP). Av teimum fýra kundi ein sjálvur velja tvær breytir til eftir áhuga, meðan hinir báðir partarnir vóru felags fyri allar luttakarar.

Tey sum undirvístu á ymsu breytunum vóru allir professorar á IMD, og serkønir innan sítt øki.

Tætta samstarvið IMD hevur við altjóða vinnulívið kom eisini til sjóndar, tí vinnulívsfólk frá altjóða kendum fyritøkum góvu eisini ein fyrilestur á OWP. Ein teirra var t.d. Paul Bulcke, CEO í Néstle (Sveis), ein av heimsins størstu fyritøkum innan matvøruídnaðin, umframt Nandan Nilekani, nevndarformaðurin í Infosys (India), ein altjóða KT-fyritøka.

Av tí at skeiðið er 'globalt' verður alt skeiðið hildið á enskum, alt tilfar er á enskum, umframt at alt networking sjálvsagt var á enskum. Tí er tað ein fortreyt at luttakararnir eru væl fyri á enskum fyri at fáa sum mest burturúr OWP.

### Professionelt fyriskipað

Eitt sum eyðkendi OWP skeiðið var tað sera høga støðið og professionalisman í allari IMD organisatiónini, líka frá professorum til hjálparfólkum sum heild. Ofta verður tosa um at brúka tíðina rætt fyri at fáa sum mest burturúr, og IMD var einki undantak – alt byrjaði til ásettu tíð og endaði til tíðina – sharp!

Harumframt merkist tað eisini væl, at IMD leggur skeiðið til rættis útfrá fortreytunum hjá vinnulívsfólkum, tí t.d. vóru hóskandi pausur vóru millum fyrilestrarnar. Tískil var tað gjørligt at avgreiða átrokandi uppgávur í eini telefonsamrøðu, ella við at brúka ein av nógvu teldunum uttanfyri fundarhølini ókeypis fyri at lesa og senda teldupost. Hetta er sera jaligt, tí tá vinnulívsfólk fara á skeið í 6 dagar, so skal felagið heima eisini røkjast samstundis.

StatoilHydro hevur eisini gjørt eitt rimmar arbeiði fyri at fyriskipað skeiðsluttøkuna hjá teimum 16 føroysku vinnulívsfólkunum. Sera góð kunning var givin, kunnandi fundur var hildin áðrenn fráferð, umframt at uppihald og samskifti við IMD um val av breytum var væl fyrireikað. Hetta gjørdi at tað var ein sonn fragd at luttaka.

### Fjølbroyttur luttakaraskari

Luttakaraskarin á OWP er sera fjølbroyttur, og 2009 var einki undantak. Í alt 240 vinnulívsfólk, flest øll stjórar ella limir í leiðslutoyminum, úr 45 londum kring heimin luttóku á skeiðinum. Nevnast kann, at Føroyar í 2009 vóru best umboðaða landi á OWP, og av somu orsøk var tað nærum eingin av teimum 240 altjóða vinnulívsleiðarunum sum eftir skeiðið ikki vistu hvar Føroyar eru. Eisini varð filmur um Føroyar vístur á stórskýggja seinasta kvøldið fyri øllum luttakarunum eftir uppskoti frá føroysku luttakarunum.

Luttakararnir umboðaðu eina stóra breidd av ídnaðargeirum, t.d. fíggjargeiran, orku, telekom, KT, shipping, mat- og drykkjuvørur, ídnaðarfeløg av ymsum slag, osfv.

Fyri at tryggja at fólk høvdu góðar møguleikar at netverka var felags døgurða- og náttúrðasteðgur á IMD sum partur av OWP.

Hetta gjørda tað til eitt sera spennandi umhvørvið at netverka í, tí tað var eitt gylt høvi at eta og tosa við starvsfelagar úr øðrum londum og heimspørtum um hvussu teirra umstøður vóru, og at læra frá teimum.

### Samandráttur

Føroysku vinnulívsfólkini ið luttóku á OWP siga, at leiðslumenningarskeiðið var sera væleydnað, og hevur tað latið eygu teirra upp fyri høga støðinum á leiðsluútbúgving ið kann fáast á IMD. Bæði tá umrøður persónliga menning umframt menning av fyritøkuni hevur hetta skeiðið verið sera gevandi. Luttakararnir vilja fegnir vísa á IMD sum ein sera góðan møguleika hjá føroyskum fyritøkum at nema sær førleikar á hægsta stigi. Hetta serliga um vinnufyritøkan hevur eitt altjóða virkisøki.

At enda vilja allir luttakararnir takka StatoilHydro fyri stuðulin til OWP leiðslumenningarskeiðið, og vóna at hendan greinin kann gera aðrar vinnufyritøkur varugar við møguleikan at nýta IMD til teirra leiðslumenning.